## Stabæk sigur nei til 33 mió

Norska felagið Stabæk hevur sagt nei takk til eitt stórt tilboð frá turkiska felagnum Trabzonspor. Tilboðið snýr seg um at keypa spælaran Alanzinho fyri 33 milliónir krónur, men Stabæk vil ikki av við spælaran fyri ta upphæddina. - Vit rokna við, at Alanzinho kann menna seg í eitt ár afturat hjá okkum, og tá fara europeisk stórfeløg at hava áhuga í honum, sigur stjórin í Stabæk, Einar Schultz.



## Arnesen ov dýrur at sekkja

Danin Frank Arnesen situr leysur í stólinum sum talentleiðari í enska felagnum Chelsea. Meðan Mourinho var venjari har, var Arnesen ein týðandi partur av leiðsluni, men síðani nýggi venjarin Scolari tók við, er Arnesen mest sum parkeraður í felagnum. Ætlanin sigst hava verið at sekkja hann, men tað hevði kostað felagnum ov nógv, og tí skal Arnesen helst halda fram, til sáttmálin gongur út næsta ár.

VÍF-StÍF 25-24 (12-13):

# VÍF á pínubeinkinum

**Vestmenningar styrktu um oddastøðuna. Men við hepnið og eini brotskastsbjarging í seinastu sekundunum eydnaðist at toga sigurin til høldar móti StÍF**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Tað eydnaðist heilt bókstaviliga hjá Agnari Joensen og VÍF at toyggja seg fram um Bárð Danielsen og StÍF sunnudagin*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

Seinastu vikurnar hevur VÍF leitað sær upp á aldudalin, meðan StÍF hevur dalað samsvarandi.

Tí vóru leiklutirnir greiðir, tá farið varð á vøllin í høllini í Vestmanna, men eftir fyrsta brikslið var tó ikki heilt so greitt, hvussu leiklutirnir vóru.

StÍF hevur ofta argað VÍF nakað, og tað stóð skjótt greitt, at tað høvdu gestirnir góðan hug til hesaferð. Marian Cirloganescu var í góða gamla lagnum, og hóast VÍF royndi at trýsta, so merktu trý misnýtt brotskøst fyrsta korterið, at tað als ikki eydnaðist at skapa nakra veruliga leiðslu.

Miðskeiðis í seinna hálvleiki tóktist tó at bragda hjá heimaliðnum. Gestirnir, sum høvdu fylgt væl við alla tíðina, mistu takið eina løtu, og góðar 10 minuttir fyri dystarlok var ein trý mála stór leiðsla bygd upp.

Men so gekk galið. Tvær útvísingar á rað góvu strandingum møguleika at spæla í yvirtali í fýra minuttir, og hetta gjørdu teir so ruddiliga dælt av.

Bara fýra minuttir fyri dystarlok stóð 22-24 á talvuni, og enn einaferð var líkt til, at VÍF skuldi vera við undirlutan móti StÍF.

Í mun til so nógvar aðra ferð, so hevði VÍF tó nakað eftir at geva av. Teir fingu næstu trý málini, men annað stigið tóktist vera farið, tá StÍF fekk brotskast við bara tveimum sekundum eftir.

Seinasti tvídysturin stóð ímillum Alexandur Johansen og Eli Müller, men hendan dystin vann Eli, og so kundu heimaáskoðararnir fegnast um, at tað enn eina ferð eydnaðist teirra liðið at vinna tvey stig. Enn er kósin sett beint móti finaluplássinum í FM-kappingini.

### FAKTA um dystin

**VÍF-StÍF 25-24 (12-13)**
**10 min:** 5-3
**20 min:** 8-8
**40 min:** 16-15
**50 min:** 21-20
**Málskjúttar**
**VÍF:** Rúni Joensen 7(3), Sámal Joensen 4, Bjarti Hansen 4, Niels Andreasen 4, Joen P. Høgnesen 2, Agnar Joensen 2, Eli Müller 1, Áki G. Olsen 1
**StÍF:** Mortan Hansen 6(1), Alexandur Johansen 5(3), Sveinur Justinussen 4(1), Bárður Danielsen 3, Cristian Preda 3, Borgar Danielsen 2, Pauli G. Hansen 1
**Brotskøst:** VÍF 6, StÍF 8
**Útvísingar:** VÍF 5, StÍF 4
**Dómarar:** Rúni Mohr & Ragnar Simonsen

## Vóru hepnir

Áki Olsen hjá VÍF viðgongur, at hann og liðfelagarnir vóru nakað hepnir, tá tað eydnaðist at fáa øll stigini til høldar móti StÍF.

– Teir eru betur fyri nú, enn teir hava verið, og eg skal viðganga, at vit vóru nakað hepnir móti endanum. Vit vinna seinastu minuttirnar 3-0, og teir misnýta brotskast í evstu løtu, so ein javnleikur hevði nokk ikki veri heilt órættvísur, má eg siga.

*Sigurin ber við sær, at tit eru fýra stig framman fyri H71 og Neistan. Er tað ikki um tað mundið, at tit nú eru vísir í einum finalusessi?*

– Slettis ikki. Sum kappingin hevur verið í ár, so kunnu øll vinna á øllum. Enn eru sjey dystir eftir, og roknar tú eitt sindur, so skulu vit helst hava tríggjarfýra sigrar, áðrenn vit kunnu kenna okkum tryggar. So hjá okkum ræður um at halda fokus á okkara uppgávum, sigur Áki Olsen.

**-mørk**

Stjørnan-StÍF 31-25 (15-6):

# Avgreitt fyri steðgin

**Stjørnan trumlaði avstað fyrsta hálva tíman, og so kundu tær taka sær av løttum, tá setningurin var avgreiddu**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Stjørnan ristist ikki á hondunum, tá StÍF kom á vitjan. Hóast tað mest sum hvørja ferð er endað við ætlaða favoritt-sigrinum, tá tær hava spælt móti StÍF seinnu árini, so hava strandakvinnur ofta argað heilt nógv í júst hesi uppgerðini.

Soleiðis varð tó ongan tíð sunnudagin. Stjørnan leyp alt fyri eitt avstað, og longu eftir góðum korteri var mest sum allur ivi um dystin beindur burtur.

Tað bar við sær, at leikferðin í seinna hálvleiki ongan tíð gjørdist tann heilt nógva. Stjørnan hevði sum so longu tryggjað sær sigurin, og hóast tær so ruddiliga tóku sær av løttum móti dystarenda, so slapp StÍF ongan tíð at skapa nakran sum helst spenning.

### FAKTA um dystin

**Stjørnan-StÍF 31-25 (15-6)**
**10 min:** 4-2
**20 min:** 9-2
**40 min:** 19-12
**50 min:** 26-15
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Durita Christophersen 6(2), Una Olsen 6, Maria við Neyst 5, Joan Midjord Djordjevic 3, Dianne Møller 3, Durita Mikkelsen 2, Edith Hansen 2, Anna Kristina Samson 2, Simona Petersen 2
**StÍF:** Ninna K. Johansen 7, Rebekka Justinussen 5, Fríðrún Danielsen 4, Louisa Andreasen 3, Sunfríð Johansen 2, Annika L. Petersen 1, Bára Berthelsen 1, Mariann L. Petersen 1, Ásgerð Káradóttir 1
**Brotskøst:** Stjørnan 3
**Útvísingar:** Stjørnan 1, StÍF 2
**Dómarar:** Hans Thomassen & Birgir Sondum